Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

Filmarnir til Oscar innstillaðir

OSCAR. Týsdagin varð avdúkað, hvørjir filmar eru útnevndir til at verða við í kappingini um Oscar-virðisløninrnar í ár.

Filmurin *American Beauty* var innstillaður í átta ymiskum kappingum, millum annað fyri besta sjónleikara, sjónleikarinnu og leikstjóra. Í høvuðsleiklutunum í hesum filmum eru Anette Bening og Kevin Spacey.

Filmirnir *The Insider* og *The Ginger House Rules* vóru innstillaðir til sjey ymiskar kappingar hvør. Tann seinna av hesum filmum hevur sviin Lasse Hallstrøm leikstjórnað.

Ein danskur filmur slapp upp í part, og tað var barnafilmurin *Bror, min bror,* sum er við í kappingini um ársins stuttfilm. Hinvegin eydnaðist tað ikki *Mifunes sidste sang* at gera seg galdandi í ársins kapping, hóast hesin filmurin hevur verið nevndur sum ein møguligur kandidatur í kappingini um besta útlendska (tað vil siga ikki-amerikanska) filmin.

Oscar-virðisløninrnar verða latnar 26. mars á stórum hátíðarhaldi, har tað enn einaferð er sjónleikarin Bill Crystal, sum skal vera vertur.

Dani tók ársins fjølmiðlamynd

FJØLMIÐLAR. Fyri fyrstu ferð nakrantíð er ein mynd hjá einum donskum myndamanni kosin at verða tann besta fjølmiðlamyndin á árinum.

Hetta avgjørdi ein altjóða dómsnevnd í Amsterdam fyri lítlari viku síðani. Tað var Claus Bjørn Larsen, sum dagliga starvast hjá Berlingske Tidende, sum vann virðislønina, sum er tann mest virda av sínum slagi.

42.215 myndir hjá 3981 myndamonnum úr 122 londum vóru við í kappingini. Myndin, sum dómsnevndin helt verða tað bestu í 1999, var tikin í eini flóttafólkalegu í Kukés í Albania. Á myndini sæst ein særdur kosovo-albani.

Hetta er 43. árið, at ársins fjølmiðlamyndir verða kosnar.

Gullfiskar í hvirlu

LIST. Tað stóðst stórur hávi av eini framsýning, sum lat upp á savninum Trapholt í Kolding seinasta vikuskiftið.

Millum verkini, sum vórðu sýnd fram, var eitt hjá Marco Evaristtis. Hann hevði funnið fram 12 hvirlur, fylt hesar við vatni, koyrt ein gullfisk í hvørja hvirlu og sett streym til. Síðani var tað upp til fólkini, sum komu á framsýningini at gera av, um tey vildu seta hvirluna í gongd, og harvið gera gullfiskasúpan burtur úr gullfiskinum og vatninum.

Ein djórarverndarfelagsskapur meldaði framsýningina til løgreglluna, sum gav stjóranum á savninum boð um at sløkkja fyri streyminum. Tað vildi hann ikki, tí tað helt hann var at gera seg inn á listarliga frælsi hjá listarmanninum.

Nógv var skrivað um framsýningina í dansku bløðunum í farnu viku, og hetta hevði sjálvandi við sær, at ein rúgva av fólki fór á framsýningina í Kolding. Hetta

Tá hesar linjur vóru skrivaðar umhugsaði løgreglan, um hon skuldi reisa ákæru móti savninum. Eingin hevði tá setta hvirlvurnar í gongd.

Subject: Teldubræv
Date: Tue 8. feb. 1999
To: post@sosialurin.fo
From: argr@tv2bornholm.dk
Reply to: argr@tv2bornholm.dk

TELDU-POSTURIN

Større kommunur ella?

Hálvthundrað kommunur í Føroyum.

Sundurbýtingin hevur mangan fingið útlendingar til at øtast, táið teir hava hoyrt, hvussu kommunuskipanin í Føroyum virkar. 45.000 fólk býtt í 50 eindir halda teir vera ómetaliga nógv. So nógv, at tað helst er ómøguligt at stýra.

Nú sær so út til, at broytingar fara at henda í kommunulógini. Óvist er kortini, hvussu verður við samanleggingum. Og undir ongum umstøðum verður talan um stórar kommunur, sæð í mum til tær kommunueindir, sum finnast í grannalondum okkara.

Her á Bornholm búgva 45.000 fólk - eins mong sum í Føroyum. Stýrisskipanin í Danmark er eitt sindur øðrvísi: her er bæði kommunur og amtskommunur.

Lat meg greiða eitt sindur frá, hvussu henda skipanin virkar her á Bornholm, og hvat politikararnir halda um hesa skipanina.

Amtskommunan tekur sær fyrst og fremst av heilsuverkinum, hægri undirvísing (studentaskúlanum), vegakervinum, sum svarar til landsvegirnar í Føroyum og eitt sindur av mentan.

Ein kann lættliga fáa tað fatan, at amtskommunan á mangan hátt kann berast saman við okkara løgting. Altso eitt forum, sum tekur sær av tí sum skal samskipast, meðan kommunurnar taka sær av restini.

Men soleiðis hongur tað ikki saman. Fyrst og fremst tí „amtið“ ikki hevur lóggávuvald. Tað vil siga, at í veruleikanum hevur „amtið“ ongan møguleika at áleggja kommunum nakað.

Kommunurnar, fimm í tali á Bornholm, hava hinvegin stórt vald. Í Danmark hevur gandaorðið seinastu mongu árini verið nærdemokratið. Alt skal leggjast út til kommunurnar, so tær kunnu avgera, hvussu nærsamfelagið verður samansett.

Uttan iva ein røtt hugsan, men nú eru fleiri kommunalpolitikakrar farnir at muta ímóti. Eindirnar gerast ov smáar, og tað gerst alt meira torført at taka avgerðir, sum ganga ímóti áhugabólkum í tí lítla samfelagnum.

Birte Skot-Hansen eitur leiðarin fyri Borgaralistanum í Nexø. Hon og hennara sita í samgongu við javnaðarflokkinum. Birte Skot-Hansen er lærari - um sekstí ár.

Fríggjakvøldið í seinastu viku gjørdi hon vart við seg.

Hon hevði fingið nóg mikið.

Skipanin riggar ikki. Alt ov nógv tíð verur brúkt til fjast. Rapportir, frágreiðingar, projekt, skipanir o.s.v.

Ikki tí at hon heldur, at alt hetta ikki skal gerast, men tí hon heldur alt hetta pappírarbeiðið bert tekur tíð. Onki kemur burturúr.

„Høvdu politikararnir heldur sett seg saman og gjørt av, hvat vit vilja við samfelagnum, so hevði nógv meira komið burturúr“, sigur hon.

Hon segði eisini, at tær fimm kommunur er ov nógv til bert 45.000 fólk. Tær hava uppgávur hvør sær, sum eru á stødd við tær uppgávur, kommunur við 50.000 borgarum gera. Og tað ber ikki til, heldur hon.

Í veruleikanum er tað helst so, at táið talan er um so smá samfeløg, sum Bornholm - og partvís eisini Føroyar - so eiga avgerðir ikki at takast á sama hátt, sum avgerðir verða tiknar í størri eindum.

Hagtøl kunnu mangan vera góð, men ofta byggja tey ikki á allan veruleikan, men heldur á tað sum er skrivað á pappír onkustaðni. Ikki altíð veruleikin heldur.

Í smáum samfeløgum ber til at hyggja at veruleikanum, sum hann er. Tær avgerðir sum skulu takast eru ofta fyri so smáar bólkar, at tað ber til at hyggja og meta um hvørjar avleiðingarnar av avgerðum verða, bert við at hyggja at sjálvum bólkinum. Tosa við tey, og spyrja tey, hvat tey halda, og so taka avgerðir.

Fólkatingsmaðurin Harald Kjøller, sum er borgarstjóri í einari av teimum fátækastu kommunum í Danmark, segði fyrr í vikuni, at demokratiið nú er býtt so smátt, at politikararnir ikki hava dirvi til at taka rættar avgerðir. Teir taka avgerðir, - ja, men teir taka ikki røttu avgerðirnar. Teir tora ikki, tí teir møta áhugabólkunum í smáu samfeløgunum.

Hvat skal so gerast í Føroyum? Eg havi ikki svarið, men avgerandi er, at politikarnir hava dirvi at taka avgerðir og standa við tær. At politikarnir siga tað, teir meina. Ikki undan einari atkvøðugreiðslu tosa ímóti einum máli, og so tá tað kemur til skarpskeringar atkvøða fyri.

Tað gagnar ongum í longdini. Hvørjum skal veljarin trúgva? Tí talaða orðinum, ella tí sum atkvøtt verður?

Spentur fylgi eg við, hvør loysn verður vald á kommunumálinum. Skal bert siga, at klókir menn í Danmark halda, at sjálvt um kommunurnar gerast størri, so verða tær ikki bíligari at reka.

Árni Gregersen,
Bornholm

FØÐINGAR

3. januar fingu Elin Maria í Homrum og Grettir Hammer, Kollafjørður, ein son. Hann var 34 cm. langur og vigaði 815 gr. Hann er doyptur Kjartan í Homrum eftir abba sínum í Kollafirði.

8. februar fingu Kristina Hansen og Rói á Rógvu Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3650 gr.

10. februar fingu Barbara Olsen, Tórshavn og Pætur S. Rasmussen, Søldafjørður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4100 gr.

11. februar fingu Elsa G. og Mogens Lützen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

11. februar fingu Rannvá M. Ólavsdóttir og Suni Hansen, Miðvágur, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 4000 gr.

13. februar fingu Armgarð Hammer og Atli Godtfred, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3700 gr.

14. februar fingu Durita og Fróði Gregersen, Syðrugøta, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

14. februar fingu Tove Midjord Jansen og Niels-Peter Mangor Jansen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3850 gr.

15. februar fingu Katrina og Alvin Joensen, Kollafjørður, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3350 gr.

16. februar fingu Tórfinnur Dalsgarð og Jóhanna Rubeksen, Velbastaður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

16. februar fingu Tamara og Óli Hans í Sjúrðagarði, Løddeknøpinge, Svøríki, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3540 gr.

17. februar fingu Laila Zachariasen og Bent H. Jakobsen, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 57 cm. long og vigaði 4300 gr.

ANDLÁT

8. februar:
Elisabeth Fugl Jensen, fødd Olsen, ættað av Viðareiði, 83 ár
11. februar:
Martin Mikkelsen, Tórshavn, 86 ár
12. februar:
Símun Petur Rasmussen, Haraldsund, 73 ár
14. februar:
Hjørleif Poulsen, Kaldbak, ættað av Tvøroyri, 71 ár
15. februar:
Kristianna Samsonsen, Tvøroyri, 74 ár
16. februar:
Simona Hansen, Glyvrar, 86 ár

Prógv

Jens Eystein Jacobsen, Miðvágur hevur lokið yrkisútbúgving sum flogmekanikari. Læruplass: Atlantic Airways, Sørvágur.

Jón Suni Christiansen, Saltangará hevur lokið yrkisútbúgving sum bakari. Læruplass: Miðberg´s bakarí, Saltangará.

Tinna Djurhuus Johansen og Joan Mikkelsen, Toftir, hava tikið prógv sum sosial- og sunnheitsassistentar við skúlan í Hammerbakken, Álborg.

80 ár

18. februar varð Dávur Isaksen, Tjørnuvík, 80 ár. Dagurin verður hildin 19.2. í Bygdarhúsinum.

Brúdleyp

Leygardagin 11. mars 2000 giftast í Hvalbiar kirkju, Noomi Hammerfoss, Froða og Danjal Olsen, Hvalba.

Vælkomst verður í Royn-høllini kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 375071 ella 375129 í seinasta lagi 26. feb. 2000.

KIRKJUR & SAMKOMUR

Septuagesima

Havnar kirkja: kl. 11, Bent Falk og Bjarni Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Argir: kl. 11, Heri Joensen
Christiansskirkjan: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Fríðrikskirkjan: kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
Svínoy: kl. 12, altarg., Meinhard Bjartalíð
Haldarsvík: kl. 12, Marjun Bæk
Miðvágur: kl. 12, Uni Næs
Skála: kl. 11,
Sjóvar kirkja: kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
Sørvágur: kl. 12, altarg., David Johannesen
Gjógv: kl. 12 messa (útvarpað)
Funningur: kl. 17, altarg., messa, Emil Olsen
Porkeri: kl. 12. Elsa Funding
Skálavík: kl. 12, Jákup R. Hansen
Tvøroyri: Petur M. Rasmussen
Sandvík: kl. 12, Ólavur Rasmussen

Frá Ebenezer

Í dag leygardag kl. 16.00 Samkoma fyri eldri.
Sunnudagin kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti, kl. 21.00 Útimøti.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma

Sunnudag kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti.

Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00 sunnudagsskúli, kl. 19.00 er møti.

Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Fríðtór Debes talar. Eisini verður vitnisburður og solosangur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 landsbøn, í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgungudstænasta, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti (um viðrar). Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin.

Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 er bøn og kl. 18 møti við Jónfinn Olsen. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Egin og Maritu, Børkugøta 35. Verið øll hjartaliga vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoma v/Una Næs presti. Evni: Fjósið í Bethlehem fyri 2000 árum síðani í samband við 1000 ára haldið fyri kristniboðanini.
Týsdagin kl. 16.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Frelsunarherurin í Havn

Sunnudagin kl. 11 Møti, Sofía Jacobsen, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Øll meinigheitin syngur.

Aglow, Tórshavn

Fundur verður í **hølunum hjá Frelsunarherinum** leygarkvøldið kl. 20, allar kvinnur eru vælkomnar.

Kvívík

Møti verður í Glæmuni leygarkvøldið kl. 20. Talari: Bergur D. Joensen. Sangur: Magni og Øssur Christiansen. Endi: Vivi Hammer. Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Talari: Regin Høgnesen. Sangur: Gullak og Jónhilda.

Saron, Vestmanna

Sunnukvøldið kl. 18 møti. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

Missiónshúsið, Vestmanna

Á ungdómsmøtinum sunnukvøldið kl. 20 verður filmurin »Prince of Egypt« sýndur. Aftaná verður grýturættur at fáa. Havið 10 kr. við. Øll eru vælkomin!

Sion, Kollafjørður

Ungdómsmøti verður aftur í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitin á Skála

Kvinnumøti hjá Sjómanskvinnuringunum sum verða skuldi mánakvøldið 21. februar er útsett til 6. mars.

Keldan, Skálafirði

Fríggjakvøldið kl. 20.30: Vón fyri framman, luttøka við David Bech. Leygarkvøldið kl. 21.00: Opið hús við Hendrik Olsen.
Sunnudagin kl. 17.00: Familjumøti, øll eru vælkomin.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

Samkoman Ørkin

Evangelisk møti verða í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará leygardagin. 20 v/Oddur Lamhauge.
Sunnudagin kl. 17 v/Theodor (Teddy) Petersen, sum talar og syngur. Húsmøti verður týsdagin kl. 20 hjá Jonnu og Palla Højgaard, Saltangará.

Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli.
Onki møti í Skopun 20.2. vegna felagsmøti í Missiónshúsinum í Skálavík kl. 19. Manskórið syngur.

Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14 verður sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Jørgen Frants og Hjørdis. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11: Breyðbróting, kl. 13.30: Sunnudagsskúli, kl. 18: Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20: Bønarfundur.
Týsdagin kl. 20: Ungdómsfundur
Ónsdagin kl. 20: Uppbygg. fundur.

Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

Aglow Suðuroy

Fundur verður í Porkeris skúla leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Porkeri

Ungdómsmøti verður í Missiónshúsinum leygarkvøldið kl. 20. Talari: Alfred Petersen. Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Talari: Tom Skaale.

Missiónshúsið í Sumba

Møti verður fríggja- og leygardagin kl. 20.00 og sunnudagin kl. 18.00. Talarar: Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Árhus

Møti verður í missiónshúsinum »Carmel« í Árhus leygarkvøldið 19. feb. kl. 19.30. Luttøka úr Esbjerg.

Heimamissiónin

Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

Føroysku gudstænasturnar

í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033.

Eysturoy:
Leygardagin 19. feb.: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490
Sunnudagin 20. feb.: Andrias Petersen, tlf. 441086

Norðoyggjar:
Sigvald Kristiansen, tlf. 455045

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður):
Tlf. 371560

Suðuroy (suður):
Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.